# Duldi vakurleikin í Vestur-Skottlandi

**Føroyingar á ferð í Skottlandi eiga avgjørt at hugsa um vestursíðina. Her kunnu føroyski ferðafólkini síggja óspilta og vakra náttúru í stórt mát**



*Sandstrond og Mølheyggur*

## Skottland 2 partur


**Heri Simonsen**
heris@sosialurin.fo

Komnir í land í Scrabster er tað, sum innara røddin rópar "Aberdeen" ella "Inverness", og føroysku ferðafólkini fara beinu leiðina suður eftir, framvið eysturstrondini. Aberdeen hevur stóran symbolskan týdning fyri samvinnuna millum føroyingar og skotar. Tað var her, at abbi ella langabbi seldu sín fisk, og mangt føroyskt heim var fjálgað við lutum og gávum, sum vóru keyptar í "Bon Accord" ella aðrastaðni í Aberdeen. Tí er eitt band, sum dregur í føroyska ferðamannin at sikta eftir Aberdeen tá ein kemur inn í Thurso, og skal velja "síðu", hvørt ein skal fara eystureftir ella vestureftir. Og higartil hava nærum øll valt at fara eystureftir, men tað kann bara skyldast, at allur vakurleikin í Vestur-Skottlandi er duldur fyri teimum. Tað ein ikki kennir, saknar ein ikki. Men nú undirritaði á fyrsta sinni skoðaði vakurleikan í Vestur-Skottlandi, er birtur í mær ein stórur longsul at vitja aftur higar. Og eigur eingin rættsiktaður ferðamaður at frásiga sær møguleikan at skoða hendan ósigiliga vakurleikan.

### Wild West

"Wild West" er ikki bara í Amerika, sama máliska kann verða nýtt fyri at lýsa landslutin Sutherland í skotska hálendinum. Ì tíðarskeiðnum millum hálvan juni, og seinast til august býðst høvi hjá føroyingum at fara við Norrønu, og vitja hesar villunar víddir. Tað fyrsta ein eigur at gera – um ein gongur ímóti fjøldini – og velur at fara vestureftir, er at bunkra í Thurso. Tí langt er millum bygdirnar, og eru nógvar bygdir – fyri føroyingar – í einari ógvuliga heimligari stødd. Tó so, bensinstøðir eru at finna, og tað við einari forsvarligari frástøðu millum tær, men tann fullkomni biltúrurin krevur, at ein bunkrar upp hvørja ferð. Tí náttúran, sum er at skoða leggur væl og virðiliga lunnar undir tann fullkomna biltúrin. Skotska landslagið er eitt litspæl av tí aðru verð, talan er um eina sanna litsýmfu, "farvusymfoni" vildi onkur sagt á gerandismálinum. Grasið, lyngurin, heiðarnar, runnarnir, villu blómirnar, skógurin, og so fjallatindirnir, ið gerast hæddarpunktini í øllum litspølunum. Teir fyrstu kilometrarnar aftaná Thurso, eru meira, sum eitt stórt vallað lendi, við m.ø. Dounray og tess gamla kjarnorkuverki, sum gav føroyingum mangar vøkunætur. Men so knappliga aftaná eina løtu á vegnum, so byrjar tann stóri vakurleikin at opinbera seg, og hvørja ferð ein heldur: "at